tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 25.03.2021 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen

Varalimir: Jónhild Nybo

Ikki møtt: Alvi Mortensen, fráboðað

Viðmerkingar: Súsanna Bertholdsen upplýsir at hon hevur sent teldupost til borgarstjóran, at hon ynskir at valið av limum í BHS verður sett á skrá.
Kristin Michelsen kunnar um, at Kommunufelagið hevur sent skriv til kommunalaeftirlitið, at kommunufelagið tekur ikki undir avgerðini hjá Umhvørvis og Vinnumálaráðnum, at ógilda valið av limi til BHS hjá Tvøroyrar kommunu.

Anita Vibergsdóttir ynskir, at málið við rokniskapinum fyri SALT verður beint í Mentanarnevndin. Jónleyg J. Bech ynskir viðmerkt at málið viðv. dagføringin av kommunustýrisskipanini verður beint í Fíggjarnevndina.

Kristina Roest fór av fundinum kl. 17:50, eftir viðgerð av mál nr. 19/21.

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 15/21 | 21/00181-1 | Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi |
| 16/21 | 20/00398-7 | Flytan av býráðsfundi |
| 17/21 | 21/00223-2 | Heimild, at skriva undir skjøl vegna Tvøroyrar kommunu sambært § 44, stk. 2 í kommunustýrislógini |
| 18/21 | 20/00409-3 | TB-Fótboltur umsókn um stuðul og nýtslurætt til Stórá kappingarárið 2021 |
| 19/21 | 20/00362-10 | TF.Thomsen -2 viðgerð av eykajáttan til keyp av matr.nr. 492a- |
| 20/21 | 21/00102-4 | Umsókn frá Suðuroyar Sjúkrahús um parkeringspláss |
| 21/21 | 21/00001-10 | Dagføringar av kommunustýrisskipanini |

| | | |
|---|---|---|
| 5/21 | 21/00146-2 | SALT -roknskapur 2020 |
| 6/21 | 21/00064-5 | Kommunulæknaavloysarar 2021 |
| | | |

Til støðutakan

**15/21**

**21/00181-1 Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 01.03.2021 | 10/21 |
| 2 Býráðið | 25.03.2021 | 15/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin)**
Alvi Mortensen berst frá at møta til býráðsfundin, og ynskir at varalimur fær fundarboð.

Samb. valúrslitinum av kommunuvalinum 10. november 2020, er tað Jónhild Midjord Nybo, sum er 1. varalimur fyri Felagslistan til sæti í býráðinum á Tvøroyri.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin

- *§ 18. Berst kommunustýrislimi frá at møta á kommunustýrisfundi vegna heilsustøðu, kunnu teir limir, ið eru valdir á viðkomandi valevnislista, krevja, at tiltakslimur fær fundarboð.*
    - *Stk. 2. Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.*
    - *Stk. 3. Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.*

**Viðmerking til §18:** *Starvið sum kommunustýrislimur verður mett sum borgaraskylda. Hetta upprunastøðið er millum annað lógarfest í kommunalu vallógini um skylduna at taka við vali, um ein er valbærur. Ein kommunustýrislimur hevur sostatt skyldu at røkja starvið í virkiskeiðinum. Hetta merkir í fyrstu syftu, at kommunustýrislimur hevur skyldu at vera á kommunustýrisfundum og á teimum nevndarfundum, har hann er valdur sum nevndarlimur. Hóast kommunustýrislimur hevur møtiskyldu, er hon ikki treytaleys. Hetta sæst eisini í ásetingunum í stk. 1 og 2 um lógligt forfall. Lógin viðger ikki út í æsir, nær talan er um lógligt forfall, og hon tekur heldur ikki støðu til, hvussu langt møtiskyldan røkkur.*

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Samsýning til tiltakslimin

**Tilmælið:**
Býráðið verður at taka støðu til, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.

**Býráðið 25. marts 2021:**
Einmælt samtykt

**16/21**
**20/00398-7 Flytan av býráðsfundi**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.03.2021 | 16/21 |

**Málslýsing:** Kommunustjórin 21. mars 2021
Orsakað av at aðalfundur er í Kommunufelagnum 29. apríl, verður mælt til at flyta býráðsfundin, sum er samtyktur at vera tórsd. 29. apríl kl. 17:00 til ístaðin at vera mán. 26. apríl, kl. 17:00.

**Býráðið 25. marts 2021:**
Einmælt samtykt at flyta býráðsfundin til mánadagin 26. apríl, kl.17:00.

**17/21**
**21/00223-2 Heimild, at skriva undir skjøl vegna Tvøroyrar kommunu sambært § 44, stk. 2 í kommunustýrislógini**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.03.2021 | 15/21 |
| 2 Býráðið | 25.03.2021 | 17/21 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 08.03.2021**
Mælt verður til, at heimila Svend Fróða Mortensen, ið er settur í starv sum kommunustjóri í Tvøroyrar kommunu hin 1. november 2019 at undirskriva skjøl um keyp og sølu av fastari ogn, leigusáttmálar, lániskjøl o.t. kommununar vegna, saman við borgarstjóranum Kristin Michelsen valskeiðið 1. Januar 2021 til 31. desember 2024.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (Kommunustýrislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 6. mai 2003.

**Fíggjarnevndin 18. marts 2021:**
Einmælt samtykt at veita kommunustjóranum Svend Fróði Mortensen, at undirskriva skjøl um keyp og sølu av fastari ogn, leigusáttmálar, lániskjøl o.t. kommununar vegna, saman við borgarstjóranum Kristin Michelsen valskeiðið 1. Januar 2021 til 31. desember 2024.

**Býráðið 25. marts 2021:**
Einmælt samtykt

**18/21**
**20/00409-3 TB-Fótboltur umsókn um stuðul og nýtslurætt til Stórá kappingarárið 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.01.2021 | 5/21 |
| 2 Mentanarnevndin | 02.02.2021 | 8/21 |
| 3 Mentanarnevndin | 02.03.2021 | 10/21 |
| 4 Fíggjarnevndin | 18.03.2021 | 14/21 |
| 5 Býráðið | 25.03.2021 | 18/21 |

Málslýsing:

**Kommunustjórin 05.12.2020**
Til viðgerðar er umsókn um stuðul, sum umsitingin hevur móttikið frá TB fótbóltur til virksemið hjá felagnum komandi ár.

**Mentanarnevndin 8. desember 2020 kl. 13:00 Avgerð**
Einmælt samtykt at málið verður viðgjørt á býráðsfundi, har umboð fyri nevndina í TB vera boðin á luttaka og greiða frá ætlanunum fyri komandi kappingarár.

**Býráðið 28. januar 2021:**
Kristin Michelsen skjýtur upp, at umsóknin til stuðul til TB, verður beint aftur í Mentanarnevndina.
**Einmælt samtykt.**
Kristin Michelsen skjýtur upp, at TB fær nýtslurættin til felagshúsið og vøllin við Stórá kappingarárið 2021.
**Einmælt samtykt.**

**Mentanarnevndin 02. februar 2021:**
Einmælt samtykt at heita á nevndina í TB um at innsenda roknskap fyri 2020 og fíggjarætlan fyri 2021.

**Mentanarnevndin 02. marts 2021:**
TB fótbóltur søkir um stuðul á kr. 600.000,- fyri kappingararið 2021. Einmælt samtykt, at stuðla við kr. 400.000,-, har 15% av stuðulsupphæddini, svarandi til kr. 60.000,- verður oyramerkt til ungdómsfótbolt, og at málið kann vera tikið upp til nýggja viðgerð í august 2021. –Stuðulsjáttanin, sum er útgoldin í 2020, og var ætlað sum stuðul til 2021 verður mótroknað stuðulsupphæddini. –Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. marts 2021:**
Bjarni Hammer mælir til at stuðla samb. umsókn kr. 600.000,-, har 15% oyramerkt til ungdómsfótbolt.
Jónley Bech og Kristin Michelsen mæla til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini

**Býráðið 25. marts 2021:**

**Uppskot A:** Bjarni Hammer mælir til at stuðla samb. umsókn kr. 600.000,-, har 15% oyramerkt til ungdómsfótbolt.

**Uppskot B:** Jónleyg J. Bech mælir til at TB Fótbóltur fær fíggjarligan stuðul á kr. 400.000,- har 15% av stuðulsupphæddini, svarandi til kr. 60.000,- verður oyramerkt til ungdómsfótbolt, og at málið kann vera tikið upp til nýggja viðgerð aftur.
Stuðulsjáttanin, sum er útgoldin í 2020, og var ætlað sum stuðul til 2021 verður tikið upp til viðgerð á fundi við nevndina í TB. TB fær sostatt stuðul á kr. 400.000,-

Fyri uppskot A: Súsanna Bertholdsen, Kristina Roest og Bjarni Hammer
Ímóti Uppskot A: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Jónleyg J. Bech og Jónhild Nybo
**Harvið er uppskot A fallið**

**Fyri Uppskot B: Einmælt samtykt**

19/21

**20/00362-10 TF.Thomsen -2 viðgerð av eykajáttan til keyp av matr.nr. 492a-**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.03.2021 | 19/21 |

**Fíggjarnevndin 05. marts 2021:**
Kristin Michelsen, Jónleyg Bech mæla til at kommunan keypir matr. nr. 492A, samb. keypssáttmála dagf.. 15.02.2021. -Bjarni tekur støðu á býráðsfundi.
Kristin Michelsen, Jónleyg Bech mæla til at veita eykajáttan til keyp av matr.nr 492A og at keypið verður fíggja við lántøku. -Bjarni tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðið 08. marts 2021:**
Súsanna Bertholdsen mælir til at málið verður beint í Mentanarnevndina
Fyri eru: Súsanna Bertholdsen, Kristina Roest og Bjarni Hammer
Ímóti eru Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Jónleyg J. Bech og Alvi Mortensen
**Uppskotið er harvið fallið**

Kristin Michelsen mælir til, at býráðið tekur undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndi har Tvøroyrar kommuna keypir matr. nr. 492A, samb. keypssáttmálan dagf.. 15.02.2021, fyri kr. 4,4 mió.
Atkvøtt var um tilmælið hjá fíggjarnevndini, fyri eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Jónleyg J. Bech og Alvi Mortensen
Ímóti eru: Kristina Roest og Súsanna Bertholdsen
Stemma blankt: Bjarni Hammer
**Uppskotið er harvið samtykt**

Kristin Michelsen mælir til, at býráðið tekur undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini at veita eykajáttan til keypið av matr.nr 492a, sum verður fíggja við lántøku.
Atkvøtt var um tilmælið hjá fíggjarnevndini, fyri eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Jónleyg J. Bech, Alvi Mortensen og Bjarni Hammer
Ímóti eru: Kristina Roest og Súsanna Bertholdsen
**Uppskotið er harvið samtykt**

**Kommunustjórin 21.03.2021)**
2. viðgerð av eykajáttan til lántøku á kr. 4,4mió., til keyp av matr. nr. 492a

**Býráðið 25. marts 2021:**
Atkvøtt var um at veita eykajáttan til keyp av matr.nr. 492a.
Fyri eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Jónleyg J. Bech, Jónhild Nybo og Bjarni Hammer
Ímóti eru: Kristina Roest og Súsanna Bertholdsen

**20/21**
**21/00102-4 Umsókn frá Suðuroyar Sjúkrahús um parkeringspláss**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.02.2021 | 12/21 |
| 2 Býráðið | 25.03.2021 | 20/21 |

**Málslýsing Tekniskur leiðari 05.02.2021:**
Uppskot er komið frá SSH um parkeringspláss. Tekniska deild mælir til at taka undir við uppskotinum. BROT ÚR TELDUPOSTI: *Tekningin sum eg gjørdi kann brúkast sum grundarlag fyri arbeiðinum, um ein frágreiðing fylgir við, sum sigur hvussu tað skal gerast, tað vil siga ein garður 1200 mm høgur, ein hill 2500mm og so skráa lendi og so kann man planta trøð í skráan sum kemur har.*

**Tekniska nevnd 08. februar 2021:**
Tekniska nevnd tekur undir við umsóknini frá SSH.

**Býráðið 25. marts 2021:**
Einmælt samtykt.

21/21
21/00001-10 Dagføringar av kommunustýrisskipanini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.03.2021 | 21/21 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 21.03.2021**
Tilmælið um dagføringar av kommunustýrisskipan galdandi fyri Tvøroyrar kommunu

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 30. apríl 2018

**Býráðið 25. marts 2021:**
Jónley J. Bech mælir til at málið verður beint í fíggjarnevndina.
**Einmælt samtykt**

**22/21**

**21/00147-2 Tvøroyrar Bókasavn - Undirskrivaður roknskapur fyri 2020**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 02.03.2021 | 19/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.03.2021 | 12/21 |
| 3 Býráðið | 25.03.2021 | 22/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin)**
Umsitingin hevur hin 24.02.2021 móttikið teldupost frá fyritøkuni Januar.fo /Jóhanna Skorastein, Cand.merc.aud. við roknskapi fyri 2020.

**Mentanarnevndin 02. marts 2021:**
Einmælt samtykt at góðkenna roknskapin hjá Tvøroyrar Bókasavn 2020

**Fíggjarnevndin 18. marts 2021:**
Einmælt samtykt at góðkenna rokniskapin fyri Tvøroyrar Bókasavn 2020

**Býráðið 25. marts 2021:**
Einmælt samtykt at góðtaka rokniskapin fyri Tvøroyrar Bókasavn 2020

TVØROYRAR KOMMUNA

## 23/21
## 21/00321-2 IRF-Ársaðalfundur 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.03.2021 | 23/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 23.03.2021)**
Umsitingin hevur móttikið bræv frá IRF, sum kallar inn til Ársaðalfund onsdagin, 21. apríl 2021 kl. 10.30 á Hilton Garden Inn, Tórshavn.

Limakommunurnar eru umboðara av øll býráðslimum til aðalfundin, har hvør kommuna, undirskrivar fulltrúarváttan til býráðslim við atkvøðurættisambært viðtøkum felagsins 12. grein, 5. stk., ið skal sendast aftur til skrivstovu felagsins áðrenn aðalfundin.

Heitt verður á luttakarar um at fráboða luttøku í góðari tíð

Dagsskrá sambært 7. grein í viðtøkum felagsins:

1. Framløga av virki felagsins í farna roknskaparári
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar
3. Val av nevnd, sí grein 14 í viðtøkum felagsins
4. Val av grannskoðara, ið skal vera ríkisviðurkendur
5. Framløga av broyttari fíggjarætlan fyri 2021 og fíggjarætlan fyri 2022 til góðkenningar
   5.1. Frágreiðing um íløguætlanina fyri 2021 og 2022
6. Uppskot til nýggja reglugerð hjá IRF um burturkast
7. Mál, sum nevndin ella lutaeigararnir vilja hava til viðgerðar

**Vegna nevndina hjá IRF**

Poul Andrias Joensen, stjóri

**Býráðið 25. marts 2021:**

Kristin Mikkelsen skjýtir upp at geva fulltrú til Anitu Vibergsdóttir at atkvøða vegna Tvøroyrar Býráð á aðalfundinum hjá IRF. Og Kristin Michelsen mælir til Alvi Mortensen verður í uppskotið til nevndarlim fyri Suðuroynna.
Einmælt samtykt

Til kunningar

## 5/21
## 21/00146-2 SALT -roknskapur 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.03.2021 | 3/21 |
| 2 Býráðið | 25.03.2021 | 5/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin)**
Umsitingin hevur hin 26.02.2021 móttikið teldupost frá stjóranum í Saltsilogrunninum við roknskapinum fyri 2020.

**Fíggjarnevndin 18. marts 2021:**
Málið var kunna og umrøtt.

**Býráðið 25. marts 2021:**
Einmælt samtykt at beina rokniskapin fyri SALT í Mentanarnevndina.

## 6/21
## 21/00064-5 Kommunulæknaavloysarar 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.03.2021 | 6/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 22.03.2021)**
Kunning um kommunulæknaavloysarar

**Býráðið 25. marts 2021:**
Málið var umrøtt og kunna

Fundurin lokin kl. 18:05

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Jónhild Nybo

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Súsanna Bertholdsen

Kristin Michelsen læs gerðabókina upp eftir at fundurin var liðugur

Ongin viðmerking var til fundarfrágreiðingina